# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit mugu fáa at vita, hví "Princess af Stars" fór úr havn, tá veðurmenninir høvdu boðað frá tropiskum ódnarveðri*

*Gloria Arroyo, forseti*

# Áleggja kvinnunum at ganga í burka

**Taliban hóttir við at revsa kvinnur, sum ikki ganga í burka**

Pakistanskir fjølmiðlar siga, at pakistanska deildin av Taliban hevur givið kvinnunum í útnyrðingspartinum av landinum boð um, at tær skulu ganga í burka. Gera tær ikki tað, verða tær revsaðar likamliga.

Pakistanska blaðið Daily Times, sum kemur út á enskum máli, skrivar í dag, at Taliban hevur hongt plakatir upp nógvastaðni í Mohmand-landspartinum, har rørslan áleggur kvinnunum at ganga í burka.

Taliban vil ikki bara hava kvinnurnar at ganga í burka. Á plakatunum ger rørslan vart við, at muslimskar kvinnur skulu ikki taka lut í arbeiði uttandura, tær skulu ikki fara á marknaðin at keypa, uttan at onkur maður í ættini er við teimum, og tær skulu heldur ikki fara til almenn tiltøk einsamallar.

Daily Times skrivar, at politikkurin hjá Taliban hevur avmarkað rættindini hjá kvinnunum í útnyrðingspartinum av Pakistan nógv. Eitt nú vísir blaðið á, at á tjóðartingsvalinum í vár sluppu kvinnurnar í Mohmand-landspartinum ikki á val. Ta avgerðina tók eitt eldraráð, og tess niðurstøða var, at tað var ikki í samsvari við mentanina, at kvinnur høvdu valrætt. Tí vórðu fleiri valhøli stongd, og kvinnur sluppu ikki at atkvøða, skrivar Daily Times.



*Taliban áleggur kvinnum í útnyrðingspartinum av Pakistan at ganga í burka*
*Mynd: Polfoto*

# Funnu bara lík

**Filipinskir kavarar funnu einki lívstekin inni í ferjuni »Princess af Stars«**

- Kavararnir funnu nógv lík inni í vrakinum, men har var einki tekin um lív, segði talsmaðurin hjá filipinska herflotanum í morgun.

Meiri enn 860 fólk vóru umborð á "Princess af Stars", tá skipið sakk í ódnarveðri tætt við oynna Sibuyan nærhendis leygarkvøldið. Filipinsku myndugleikarnir siga, at vanlukkan hevur kravt meiri enn 800 mannalív.

Tey fáu, sum eru bjargað á lívi, hava greitt frá, at bjargingarbátarnir holvdust, tá teir blivu settir út, tí sjógvurin var so ringur.

»Princess af Stars« var 24.000 tons til støddar, og eitt reiðarí í Filipsoyggjunum átti skipið.



*Ann Dunwoody hevur verið í amerikanska herinum í 33 ár*
*Mynd: Polfoto*

# Fyrsta kvinnan við fýra stjørnum

**Eftir at hava verið í amerikanska herinum í 33 ár, er Ann Dunwoody vorðin generalur**

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur ein amerikonsk kvinna fingið generalbúna við fýra stjørnum á akslunum, sum er hægsta tign í amerikonsku verjuni.

Tað hendi á einum hátíðarhaldi á herstøðini Fort Belvoir í statinum Virginia í gjár, tá Ann Dunwoody varð tilnevnd generalur og næstovasti fyri útgerðardeildini hjá amerikanska herinum. Frammanundan eru ellivu generalar, sum hava fýra stjørnur, og teir eru allir menn.

Eftir reglunum skal Senatið í Washington góðkenna Ann Dunwoody sum general, men tað verður ikki hildið at vera nakar trupulleiki, skrivar AP.

## STUTT SAGT

### Ósekur dømdur fyri dráp

Ein 18 ára gamal breti er dømdurí fongsul fyri at hava myrt eina polska kvinnu, sum var í London og lærdi til sjúkrarøktarfrøðing. Tann 18 ára gamli bleiv ikki dømdur fyri at hava verið teirri 26 ára gomlu kvinnuni at bana, men fyri at hava ábyrgd av drápinum, tí hann var hjásatddur og tók lut í einum skotbardaga, har tann polska kvinnan eisini var. Í rættinum kom fram, at tað var ikki ein kúla frá tí 18 ára gamla, sum drap ta polsku kvinnuna, men at tað var ein annar maður, sum skjeyt. Løgreglan tók ein annan ungling í sambandi við skottilburðin, men tað bar ikki til at prógva, at hann hevði verið har. Tí má tann 18 ára gamli bøta, sjálvt um hann á ein hátt er ósekur.



*Byrsumaður bleiv dømdur, hóast hann ikki skjeyt*
*Mynd: Reuters*

### Mugabe skal útihýsast

Malloch-Brown, lordur, sum er bretskur ráðharri í afrikonskum og asiatiskum viðurskiftum umframt samskiftinum við ST, vil hava altjóða samfelagið til at útihýsa zimbabwiska forsetan Robert Mugabe. Malloch-Brown sigur, at fólkið í Zimbabwe bíðar eftir altjóða røddini, sum hann tekur til. Hann heitir samstundis á tey afrikonsku londini ov biður tey leggja trýst á Mugabe og heldur styðja andstøðuleiðaran Morgan Tsvangirai.